Leygardagur

# Dimmalætting

»Okkara Gulu«
í blaðnum í dag

Nr. 184 • 118. árgangur • 2. desember 1995 • Tlf. 11212 • Fax 10941 — ÁLÍTANDI TÍÐINDI 7 kr.

*Átjan feløg skulu undir leiðslu av Dopas fara undir oljuboringar í Lopra* Mynd: Jan Müller

## 18 vilja bora í Lopra

**Oljuboringar í Lopra:** Tá freistin at boða frá luttøku var úti kl. 12 í gjár, høvdu átjan feløg boðið sær til at taka lut í vísindaligum oljuboringum í Lopra.

PÓL Á KLETTI

– Ikki bert suðuroyingar, men allir føroyingar fáa gagn av hesum. Vit kunnu tí við góðari samvitsku siga, at 1. desember 1995 er dagurin, Føroyar fóru upp í oljuvinnuna.

Hetta sigur Johan Mortensen, stjóri á felagnum Petro Marr.

### Framhald av verkætlan

Í gjár á middegi var freistin úti hjá oljufeløgum at boða frá luttøku í boriverkætlanini í Lopra.

Verkætlanin er eitt framhald av teirri vísindaligu boringini, ið fór fram í Lopra í 1981.

Endamálið við hesi verkætlanini er at fáa meira vitan um føroysku undirgrundina, sum bæði er av týdningi fyri framtíðar kolvetnisleiting og ein hjálp hjá føroyskum myndugleikum í arbeiðnum at leggja ein føroyskan politikk á oljuøkinum.

Oljufeløg standa fyri fíggingini av verkætlanini, ið er mett at kosta umleið 30 mió. kr.

Danska oljufelagið DOPAS, ið er dótturfelag hjá DONG, stendur fyri verkætlanini, saman við dótturfelag sínum Danop.

### Altjóða áhugi

Út frá stóra áhuganum, sum vísti seg, verður mett, at verkætlanin nú hevur møguleika fyri at verða gjøgnumførd sum ætlað.

Johan Mortensen, stjóri á Petro Marr, ið saman við Tvøroyrar Kommunu fyrireika oljuútgerðarhavn á Drelnesi, sigur, at tá heili átjan feløg hava boðað frá, at tey eru áhugað fyri ætlanini, er tað eitt tekin um, at stórur altjóða áhugi er fyri Føroyum sum framtíðar oljuídnaðarøki.

Hann heldur enntá, at 1. desember skal metast sum dagurin, tá Føroyar fóru inn í oljuøldina.

### Bora helst í mai

Tey luttakandi feløgini verða nú boðin til dundar hjá DOPAS 11. desember at tosa um ymsar løgfrøðisligar og tekniskar spurningar í sambandi við verkætlanina.

Samstarvsavtala verður undirskrivað í seinasta lagi 15. januar í komandi ári.

Sjálv boringin í Lopra byrjar ætlandi longu í mai.

## Útróðarbátar fiskað tvífalt so nógv í 1995

**Útróður:** Nýggjastu tølini hjá Fiskivinnudeildini í Tinganesi benda á, at 627 útróðrarbátar undir 20 tons í 1995 avreiða fyri umleið 50 milliónir krónur. Í fjør var talið 26 milliónir krónur.

DIA MIDJORD

Útróðrarflotin er eftir øllum at døma nógv mentur í 1995, í mun til árini frammanundan.

Í 1993 avreiddu ikki fleiri enn 300 bátar, meðan talið í dag er meira enn tvífaldað, 672.

– Eg haldi, at onkuntíð hevur talið verið meira enn 700 bátar, sigur Eyðfinn Finnsson, sum starvast á fiskivinnudeildini í Tinganesi.

Tað eru tó ikki allir bátarnir, sum hava útróður sum vinnuveg burturav. Tað eru millum 100 og 200, sum driva útróðurin sum vinnuveg.

Lesið á síðu 12

## V&B: Vit mugu hava tvey skip

**Vaktarskip:** – Eg meti ikki, at Vaktar- & Bjargingartænastan kann fungera við minni enn tveimum skipum.

EMIL L. JACOBSEN

Hetta sigur stjórin á Vaktar- & Bjargingartænastuni, Jóan Karl Høgnesen, í eini viðmerking til spariuppskot hjá Bjørn á Heygum, løgtingsmanni, í blaðnum í gjár.

– Eg veit ikki, um Bjørn á Heygum meinar við, at annað skipið skal leggjast og manningin sigast upp, men vit hava sum nú er so avgjørt ikki ov nógv av fólki á Vaktar- & Bjargingartænastuni, sigur Jóan Karl Høgnesen.

Hann ivast eisini í, um tað í heila tikið kann finnast nøkur sparing í at skerja V&B. Skipini, Tjaldrið og Ólavur Halgi eru gomul, og tyngja ikki um raksturin í dag. Hitt, Spógvin er so lítið, at tað neyvan sæst aftur á nakrari fíggjarlógini.

– Eg haldi at ein sparing av hesum slagnum er burturvið, tí spurningurin er, um tað ikki fer útaftur í øðrum útreiðslum, t.d. flotanum, sigur hann.

Lesið á síðu 4



Mynd: Jens Kristian Vang

## Jólini nærkast í hvørjum

**Jól:** Vit eru komin inn í desember mánað, og longu nú eru handlar og fyritøkur komin í góðan jólahýr

Lýsingar og tiltøk hava í hesum døgum sum oftast fingið eitt uppískoyti – jól.

Nógv sølubløð verða hvønn dag tveitt inn gjøgnum blaðsprekkuna.

Í SMS hava tey í nakrar dagar arbeitt við at seta upp ein jólabý, og hesin verður tendraður í dag kl. 14.

Jólamaðurin á myndini er millum íbúgvarnar í hesum býi, sum hevur verið fastur táttur at seta upp seinstu sjey jólini.

Í tvey samdøgur hava menn frá eini danskari fyritøku arbeitt við býnum.


## Í BLAÐNUM Í DAG



### Show uttan nakað "show"

Tey flestu av teimum umleið 500 fólkunum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið, tá ið miðbýarhandlarnir í Havn royndu at bróta upp úr nýggjum við ótraditionellari mótasýning, tóktust ikki hava fingið tað, tey komu eftir.

Síða 6

### Bankakanningin er 70.000 síður

Tamil-málið er bert ein dropi í havinum samanborið við føroysku bankakanningina, sum nú rættiliga er komin í gongd. Tað er nú greitt, at fyrstu avhoyringarnar verða í Københavns Byret í mars mánaði. Rætturin hevur avsett 30 rættardagar til avhoyringarnar.

Síða 3

### Axel Tórgarð nýggja lestrarbók

Forlagið Stiðin hevur givið út lestrarbókina "Livið spratt av kærleiks rót" eftir Axel Tórgarð, presti. Axel Tórsgarð sigur, at fólk hava tikið væl ímóti bókini. Tað eru kirkjuráðini í Norðurstreymoy og Mentunnargrunnur Føroya Løgtings, sum hava stuðlað útgávuni.

Síða 7

### Vakstrarhúsárinið økist

Tann serliga nevndin, sum ST hevur sett at viðgera veðurlagsviðurskifti, IPCC, hevur daprar spádómar um veðurlagið komandi árini. Miðalhitin á Jørðini fer komandi árini at hækka við tveimum stigum, og heimshøvini fara at hækkast slakan metur innan næstu øldina.

Síða 10

### Ársins songrødd kjósast í kvøld

Finalistar úr Eysturoynni, Havn, Vágoynni, Sandoynni og Suðuroynni skulu í kvøld á pallin í Gundadalshøllini í kappingini um at gerast ársins songrødd 1995. Eisini verður "King Lion" av Jamaica á skránni. Hann er m.a. kendur við lagnum "Gypsy Woman".

Síða 11